# ðar, gamlar og viðkvæmar




**Mynd 4**
*Grønu økini vísa, hvar korallir eru. Økini avmerkt við skákstrikum vísa hvar korallir hava verið, men sum nú eru burtur orsakað av troling*

har, og onga aðrastaðni. So um korallirnar hvørva, so hvørva hesi djórini eisini.

## Havsins bulldozarar

Fyrr hava koralløkini fingið frið, men tey síðstu 20 árini ella so eru trolingar hjá fiskiskipum blivin munandi effektivari, og hetta hevur havt við sær, at fleiri koralløki eru oyðiløgd. Við nýggjari tøkni bleiv møguligt at trola eftir fiski í støðum, ið fyrr ikki var atkomiligt. Sum ein bulldozari kundu trolini fara ígjøgnum korralløkir fyri at fáa fiskin, ið livir har, og eftir eru oyðimarkir av sandi, móru og deyðum korallrestum, sum sæst á mynd 3.

Eisini er komið fram, at føroyskir fiskimenn við vilja hava oyðilagt svamp- og koralløki fyri at vaksa um økið, har gjørligt er at trola. Túsundavís av árum at byggja upp - nakrir fáir dagar at bróta niður. Men tey síðstu árini hava ymsar kanningar verið gjørdar, og meira ljós hevur verið varpað á trupulleikan.

Ein spurnarkanning varð gjørd í 2002 av Fiskirannsóknarstovuni, har skiparir vórðu spurdir um koralløki kring Føroyar. Kanningin vísti, at stór øki vórðu horvin, sum sæst á mynd 4.

## Fakta: Korallir við Føroyar

**Sløg av korallum:** Undir Føroyum eru 5 ymisk sløg av korallum, men nógv mest er til av Lophelia pertusa. 3 sløg av smáum korallum eru umframt eitt annað stórt slag.
**Litur:** Korallini eru hvít, men kunnu eisini vera eitt sindur reydlig.
**Hiti:** 4 - 12 gradir.
**Botnur:** Tær liva á hørðum botni, t.d. á hellu ella blandaðum botni (tvs. sandur og steinar), soleiðis at korallirnar kunnu festa seg á botnin.
**Dýpi:** 200 – 1000 m
**Streymur:** Korallir dáma best har tað rekur hart. Hetta hevur tvær orsøkir, 1: Meira matur kemur til tær, 2: Tær vera reinari, smáir partiklar klára ikki at leggja seg á greinarnar.
**Djóralív:** Upp til 300 ymisk smádjór á og við eina korall. Tey mest kendu eru bustormar "polychaeta" og smáar marflugur "amfipodir". Hesi smádjór eru matur hjá øðrum størri djórum, so sum ymiskum fiskum. Hetta ger, at tað er sera nógv lív við eitt koralløkit.

## Vón fyri framman

Tíbetur eru enn øki eftir við korallum um okkara leiðir, og nøkur av teimum eru enntá stongd koralløki. Hesi síggjast á mynd 5. Men av tí at hesi eru so fá, er spurningurin um tað er nokk, og um hvat fer at henda við hinum økjunum.

Fiskimenn eru tó blivnir meira tilvitaðir um korallir og botnin annars, og nýggjur fiskireiðskapur avspeglar hetta, t.d. við umhvørvisvinarligum trolgrunni ið rullar eftir botninum á hjólum soleiðis, at hann ikki skaðar botnin so nógv. Ein vanligur grunnur rullar ikki, men verður drigin eftir botninum.

## Okkara arvur

Oljan og jarðfrøðiliga tilfeingið verður til endans uppbrúkt, men tað lívfrøðiliga tilfeingið kann vara so leingi, sum mannaættin er á foldum, um tað bert verður handfari burðardygt.

Korallir eru neyðugar fyri at tryggja lívfrøðiliga fjølbroytnið í sjónum, og tí er alneyðugt at steðga við at oyðileggja tey koralløkini, sum eftir eru. Sjálvandi er týdningarmikið, at útvinna tað náttúrliga tilfeingið vit hava, men samstundis má man ikki undirvurdera týdningin av koralløkjum í føroyskum sjógvi. Tey eru okkara arvur, og komandi ættarlið skulu helst eisini hava møguleika at útvinna teirra tilfeingið, og samstundis undrast á havsins vøkru, men eisini týdningarmiklu, dýrgripir.



**Mynd 5**
*Grønu økini og økini avmerkt við skákstrikum sunnanfyri Føroyar eru stongd koralløki. Svørtu prikkarnir eru tóv hjá lemmatrolarum frá 1995 til 2002. Sum sæst, verður dúgliga fiskað kring Føroyar, og um samanborið verður við mynd 4 sæst, at flestu koralløki eru ikki stongd*

## Fakta: Heimssamfelagið fylgjir við

Alsamt størri trýst er komi uttan úr heimi um, at tað náttúrliga tilfeingið skal veiðast burðardygt. Ein partur av at veiða burðardygt er, at friða umráði sum hevur týdning fyri tað, man veiðir. Í 2003 heitti World Wildlife Foundation (WWF), ið er ein altjóða felagsskapur sum verjir høtt djór og økir, á føroysku myndugleikar, at víðka um trolfria økið á Føroyabanka, so hetta bleiv flutt frá núverandi 200m dýpdarkurvuni, til eisini at fevna um økið niður av hellingini av Bankanum. Hetta hevði gjørt, at korallirnar kring Bankan vórðu vardar ímóti troli. Í brævinum til Fiskimálaráðið vísti WWF á, at gjørdu vit hetta, so handlaðu vit eftir OSPAR sáttmálanum, sum Føroyar hava undirskrivað. Í hesum sáttmálanum binda Føroyar seg til at verja havumhvørvið móti skaðaárinum, sum kunnu standast av mannaávum.